

## Christian framvegis skaddur

Christian Lamhauge Holst spældi ikki við, tá ið danska 1. deildarliðið Lyngby spældi venjingardyst um vikuskiftið. Dysturin var ímóti Hvidovre, og Lyngby vann 1-0. Christian Lamhauge Holst var fyrr í ár tikin út til føroyska bruttolandsliðið, men noyddist at geva avboð vegna skaða. Síðani hevur Christian ikki spælt við hjá Lyngby, sum hevur spælt onkrar venjingardystir.

## Beckham aftur á blettinum

David Beckham spældi aftur við hjá Real Madrid um vikuskiftið. Hann hevur annars verið uttanfyri hópin, eftir at hann gjørdi sáttmála við LA Galaxy. Leygardagin tók venjarin Beckham við aftur á liðið, og tað var eitt gott hugskot. Í fyrra hálvleiki skoraði Beckham beinleiðis við frísparki, og Real Madrid vann dystin 2-1.

- Beckham er ein skilagóður persónur, og hann hevur altíð rætta hugburðin, sigur venjarin Fabio Capello.

# Fantastiskt

**Eitt H.C. Andersen ævintýr hevði neyvan skrivað ein meira eydnuríkan enda. Sveinur Justinussen kom, sá og sigraði í steypafinaluni**

HONDBÓLTUR

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Sveinur Justinusen hevur verið skaddur alt hetta kappingarárið, og undan finaludystinum í Coca Cola-kappingini hevði hann ongan dyst spælt fyri strandingar í ár. Hann var tó við í hópinum hjá strandingum leygardagin, og við seinasta málinum var hann eisini maðurin, sum vissaði StÍF sigurin.

- Tað er ótrúliga stuttligt at spæla eina finalu í sínum fyrsta dysti, og so at vinna hana, tað er fantastiskt.

Hetta var fyrsta reaktiónin hjá Sveini eftir dystin. Hann helt eisini, at bæði verjan og Marian spældu týðandi leiklutir síðstu løtuna av dystinum.

- Marian hevur tað við at lukka málið fullkomiliga av í onkrum dysti, og hetta gjørdi hann síðstu løtuna av finaludystinum. Verjan hjá okkum kom eisini rættiliga í gongd síðstu løtuna, og hetta ger bara Marian enn betri í málinum.

Sum heild var Sveinur eisini hampiliga væl nøgdur við sín egna innsats, sjálvt um formurin helst ikki er tann besti enn.

- Eg haldi, at tað gekk heilt hampiligt í dag. Formurin er sjálvandi ikki tann besti, men eg royndi at gera mítt besta, helt hann.



*Smílið var ovurstórt, tá Sveinur Justinussen saman við liðfeløgunum kundi taka móti steypinum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Kempa allan vegin

Enn einaferð eydnaðist StÍF at vinna mansfinaluna í Coca Cola-kappingini. Leivur Justinusen hjá strandingum var sera fegin um sigurin, men hann helt tó, at tað sá svart út eina løtu.

- Hetta er heilt ótrúligt. Vit kempa allir allan dystin, og hetta gevur úrslit. Tað vóru tíðir í dystinum, har tað ikki sá so gott út, men vit trúðu alla tíðina uppá okkara møguleika. Tá vit so nærkast endanum, haldi eg, at psykan hjálpir okkum. Vit hava jú roynt hetta so ofta fyrr, og tað tykist, sum vestmenningar missa høvdið eitt sindur. Teir spæla ein góðan dyst, men móti endanum bívur tað heldur individuelt hjá teimum.

Leivur fegnaðist eisini um leiklutin hjá verjuni og Marian í málinum síðst í dystinum.

- Verjan fær ikki fatur á so nógvum ígjøgnum dystin, og tí gerst arbeiði hjá Marian heldur strævið í málinum. Móti endanum far verjan tó rættiliga fatur á VÍF, og tá blívur Marian góður. Síðstu 10 minuttirnar tók hann alt, og etta førir okkum inn aftur í dystin.

Leivur Justinusen hevði ligið við fepuri undan dystinum, men á sjálvum finaludegnum var hann heldur betri fyri. Tí valdi hann eisini at spæla, og hansara leiklutur sum straffiskjútti bleiv sera týdningarmikil. Vt spurdu hann, um hann ikki føldi nakað trýst.

- Nei, eg haldi ikki, at eg hevði nervar undan teimum seinastu brotskøstunum. Eg var klárur, tá ið eg fór at taka tey, og eg visti, at bólturin skuldi bara í málið. Sjálvandi er tað verri, tá ið 1500 fólk sita og hyggja at tær, men eg føldi meg ikki nakað serliga trýstan.

**-teitur**

*Hóast hann hevði ligið í seingini stóran part av vikuni, so megnaði Leivur at vera partur av finaluni. Og við tryggum brotskastsskoringum var hann ein týðandi orsøk til sigurin*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



# – Vit byrja at spæla sikkurt

Agnar Joensen hjá VÍF var sera vónbrotin, eftir at vestmenningur enn einaferð máttu lúta fyri StÍF í eini steypafinalu. Hann helt, at spælið var gott at kalla allan dystin, men móti endanum kiksaði.

- Vit spæla sera væl í 50 minuttir av dystinum, men síðstu 10 minuttirnar missa vit alt á gólvið. Eg haldi, at vit byrja at spæla ov sikkurt hesa løtuna. Vit blíva bangnir fyri at gera mistøk, og so missa vit tempo í okkara



*Nú má fokus haldast á landskappingini, heldur ein vónbrotin Agnar Joensen*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

álopsspælið, og tí verður alt ov lætt hjá teimum at verja. Vit spæla eisini breitt allan dystin, og vengurnir koma sera væl frá dystinum. Serliga Regin á høgra vongi spældi ein góðan dyst, men síðstu 10 minuttirnar fáa vit slett ikki hesar við í spælið.

Agnar helt eisini, at tað helst var ein feilur at skifta Eli Müller út í seinna hálvleiki.

- Eli stendir ein fantastiskan dyst í málinum, og hann átti helst størstu ábyrgdina av, at vit høvdu vunnið okkum eina trygga leiðslu í fyrra hálvleiki. Í byrjanini av seinna hálvleiki velja vit at skifta hann út, og hetta er helst ein feilur. Ikki tí at Bárður spældi illa, men tá Eli stendir so væl, so skal hann bara vera í málinum.

- Nú hava vit enn einaferð tapt eina steypafinalu, so nú mugu vit royna at halda fokus á landskappingini. Hana mugu vit bara vinna nú, staðfesti ein sera skuffaður Agnar Joensen eftir ósigurin fyri strandingum.

**-teitur**